www.sunda.fo

SUNDA KOMMUNA

# Námsfrøðingar til Dagstovnin á Flatinum, Oyrarbakka

**Vit søkja eftir 3 námsfrøðingum til barnagarðin og frítíðarstovuna, at arbeiða ávikavíst 30 og 25 t pr viku, at byrja 8 august 11. Tímatal og nær byrjast kann, kunnu vit eisini tosa um.**

Á stovninum leggja vit dent á viðurkennandi námsfrøði; og arbeiða m.a. við amboðum sum - Stig fyri Stig, fyri at menna barnsins sosialu og kensluligu førleikar – Tras, fyri at eygleiða málmenningina í dagligum samspæli og brúka m.a. náttúruna fyri at menna barnins rørslu og sansaskipan.

- Tú kemur at arbeiða saman við námsfrøðingi og hjálparfólkið
- Er hetta nakað fyri teg, hevði tað glett okkum at frætt frá tær.

Setanarviðurskifti: Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

Meira fæst at vita: um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf. 297247 ella Turið Vík varaleiðara á tlf. 297246

Tú ert eisini vælkomin inn á okkara heimasíðu 123hjemmeside.dk/flatinum at lesa meira um okkara ynskir, førleikakrøv v.m.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagið mánadagin 23 mai 11 og sendast til:

Dagstovnurin á Flatinum
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka

ella flatinum@sunda.fo

Sosialurin 341800

ÍSF 1939

# Ítrótta- og ungdómsgáðgevi til Ítróttasamband Føroya

Fyri ítrótta- og ungdómsráðgeva í barnsburðarfarloyvi søkir Ítróttasamband Føroya eftir avloysara at byrja skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 1. august 2011.

Ítrótta- og ungdómsráðgevin arbeiðir á skrivstovuni hjá Ítróttasambandi Føroya. Arbeiðið fevnir um at skipa fyri skeiðum og útbúgving av leiðarum og venjarum í ítróttafeløgum. Ráðgevin skipar eisini fyri upplýsingarátøkum. Ein partur av arbeiðinum er eisini at ráðgeva sersambondum og ítróttafeløgum. Ráðgevin tekur, í tann mun tað er neyðugt, eisini lut í dagliga arbeiðinum á skrivstovuni.
Nakað av arbeiðinum er skipað í verkætlanum.

Vit leggja dent á, at umsøkjarin hevur hóskandi útbúgving og dugir enkst og norðurlendskt í skrift og talu.
Ráðgevin skal hava góðar førleikar at samskifta og samskipa og skal arbeiða sjálvstøðugt.

Roknast kann við, at partur av arbeiðinum er um kvøldið og í vikuskiftunum.

Løn og setanarviðurskifti verða eftir avtalu.

Freistin at søkja er fríggjadagin 27. mai 2011.

Umsóknin skal sendast til:
*Ítróttasamband Føroya*
*Postboks 223*
*FO-110 Tórshavn*
*ella til pep@isf.fo*

Vilt tú vita meira um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við Anniku H. Lindenskov ítrótta- og ungdómsráðgeva tlf: 282331 ella Petur Elias Petersen, forseta tlf: 210299.

Sp/f. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

Starvslýsing

Heimatænastan

## Starvsfólk til stovnsøkið hjá Børn og Ung

Søkt verður eftir einum starvsfólki at byrjað á Rókini 1. august. 2011 og tveimum starvsfólkum at byrja í Sandágerði ávikavist 1. august 2011 og 1. september 2011. Talan er um fulltíðarstørv.
Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Súsannu Holm, leiðara, tlf. 360000.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Nærverkið**
Børn & Ung
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Súsanna Holm,leiðara

**Umsóknarfreist:.** 27. Mai 2011.

## Pedagogar til Bústovnin og Sambýlið á Mýrivegi í Klaksvík

Á Bústovninum búgva 4 ungir menn við við sjúkugreiningini autisma. Søkt verður eftir 2 pedagogum til farloyvistørv, at byrja skjótast gjørligt. Annað starvið er til 15.11.11 og hitt til 31.12.11.
Á Sambýlinum búgva 6 fólk við menningartarni. Har verður søkt eftir 2 pedagogum, at byrja 01.08.11.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 763250.

**Umsókn**
Umsókn við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og CV skulu sendast til:

**Bústovnin/Sambýlið**
Mýrivegur 13
FO 700 Klaksvík
T-postur: bumyruv@naerverk.fo

**Umsóknarfreist:** 27. mai 2011.

## Pedagogur til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík

Talan er um 1 pedagogstarv á 40 tímar um vikuna, frá 1. sept.2011 ella eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 763130

Hevur serøkið tín áhuga, og vil tú vera við til at gera tína ávirkan galdandi, so send eina umsókn.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Bústovnurin á Rúnarvegi 6**
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðari

**Umsóknarfreist:** 1. juni 2011.

Lesið meira á heimasíðu okkara: www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

